# Faroe Jet eru klárir at fara á flog

**Faroe Jet fer á flog mánadagin 10. mai.
- Tað er enn okkurt smávegis, sum skal fáast uppá pláss, men vit fara at verða klárir til mánadagin, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri á Faroe jet**

FLOGFERÐSLA
Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

Flogfarið hjá Faroe Jet kemur til landið sunnudagin, og longu mánadagin skal tað flúgva sín fyrsta túr. Vit hava ringt til stjóran í Faroe Jet og spurt hann, hvussu tað gongur við fyrireikingunum.

- Vit eru klárir. Tað hava verið nógvar avbjóðingar hesa síðstu tíðina, og tað er sera spennandi hjá okkum. Vit fyrireika alt tað, sum vit kunnu, men sumt má bíða nakrar dagar enn. Onkrir trupulleikar hava verið við bookingskipanini, tí at vit kunnu ikki fáa eina kotu, sum vit skulu brúka, fyrr enn flogfarið er skrásett. Men flogfarið verður skrásett í dag, so tað verður helst fingið í rættlag í næstum.




*- Tað er heilt vist pláss fyri tveimum feløgum á Føroyaleiðini. Í fjør ferðaðust 180.000 fólk um flogvøllin, og í ár verða tað helst enn fleiri, so tað er ein marknaður fyri tí, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri í Faroe Jet*

- Summir byrjunartrupulleikar eru sjálvandi, men vit vænta, at alt verður klárt til tann stóra dagin mánadagin, sigur Jóhan E. Simonsen.

Undirtøkan fyri verkætlanini hjá Faroe Jet hevur verið góð. 950 fólk hava sett pening í, og ferðaseðlasølan hevur verið góð teir fyrstu dagarnar.

- Fólk hava verið sera positiv, og vit vóna, at vit kunnu bjóða teimum eina góða tænastu. Vit hava tosað við nógv fólk og fingið ráð frá teimum, sum fyrr hava roynt seg á Føroyaleiðini. Vit, sum arbeiða her, hava eisini nógvar royndir á leiðini, so vit halda ikki, at vit byrja á berum. Vit hava góðan førning av royndum og førleika.

- Tað er gott við kapping, og eg haldi, at fólk eru glað fyri at eitt felag er komið afturat. Kappingin sæst longu nú, áðrenn vit eru byrjaðir, sigur Jóhan E. Simonsen. Hóast Atlantic Airways er eitt stórt felag, og onnur feløg fyrr hava roynt at tikið kappingina upp uttan stórvegis eydnu, so er Jóhan við gott mót.

- Tað er heilt vist pláss fyri tveimum feløgum á Føroyaleiðini. Í fjør ferðaðust 180.000 fólk um flogvøllin, og í ár verða tað helst enn fleiri, so tað er ein marknaður fyri tí.

